Fylgiskjal 2

LM-033/2023

Viðmerkingar til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru (foreldramyndugleikalógin)

MEA hevur hesar viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar:

Viðmerkingar til §21

Her er endamálið at forða fyri samverusjikanu, og soleiðis tryggja rættindini hjá barninum til samveru við bæði foreldrini. Uppskotið um at Bústaðarforeldrið skal leggja sína feriu við virðing fyri longu avtalaðari ella ásettari samveru við Samveruforeldrið, halda vit er eitt sera gott uppskot, sum tíðiliga fyrst og fremst tekur hædd fyri tørvi barnsins. Vit taka tí fult undir við at avmarkað rættin hjá Bústaðarforeldrinum, í hesum føri.

Viðmerkingar til §29

Í hesum brotinum verður gjørt greitt, at tað eru foreldrini, sum hava felags ábyrgd av at leggja til rættis ferðing í samband við samveru. Hesum sjónarmiði taka vit fult undir við. Tó meta vit, at rætturin hjá báðum foreldrunum at seta fram umbøn til Familjufyrisitingina, um at áseta býtið av ábyrgd í samband við ferðing teirra vegna, eigur at verða varveittur -ikki bert sum eitt snævurt undantak, men heldur sum ein veruligur møguleiki hjá foreldrum, at veita sær hjálp, tá ið tey eru í konflikt, og ikki sjálvi seta seg føran fyri at taka skilabestu avgerð vegna barn/børn teirra.

Vit mæla tí til, at Stk. 2. verður orðað nakað soleiðis: *Um annað av foreldrunum setur fram umbøn, kann Familjufyrisitingin taka avgerð um, hvussu ábyrgdin av ferðingini í samband við samveru skal býtast millum foreldrini.*

Orðingini av Stk. 3. taka vit undir við.

Viðmerkingar til §45

Hendan lógarbroytingin verður grundgivin við, at tað í galdandi lóg, ikki er tikið hædd fyri teimum fíggjarligu avleiðingunum av rættinum hjá báðum foreldrum, at verða javnsett í síni umboðan í málum um samveru, og at rættindini tí eiga at vera skerd til bert at fevna um bústaðarmál. Tó so verður rætturin til ókeypis umboðan galdandi í samverumálum, um hesi verða viðgjørd saman við bústaðarmálum.

Við støði í hesu fíggjarligu grundgeving fyri lógarbroytingini, halda vit tað vera vert at umhugsa hettar: Kann tað hugsast, at ein avleiðing av at skerja rættindini í samband við samverumál, verður at foreldur fara at troyta teir møguleikar til hálp, ið tey hava rættindi til, og at tað tískil fara at koma fleiri umsóknir um bústaðarmál, har rætturin til at viðgerða samverumál samstundis, enn er galdandi? Og hvørjar verða so fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum?

Aðrar viðmerkingar

Tað er gott, at høvið nú eisini verður nýtt til at skapa betri yvirlit í lógini, við at seta fleiri yvirskriftir.

Tað eigur at verða tikið hædd fyri ST Barnarættindasáttmálanum, eins og tað verður tikið hædd fyri øðrum tvørgangandi millumtjóðasáttmálum.

Vígdis Skorheim

Stjóri

MEA-Húsið fyri familjumenning

Nólsoyar Pálsgøta 2

700-Klaksvík

www.mea.fo